# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin nakað minni vindur av vestri,. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið frískar hann vindin av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin hvassur vindur ella skrið av eystri og regn. Hitin um 6 stig. Sunnudagin upp í hvassan vind av vestri og ælingur, partvís kavi. Hitin niður móti frostmarkinum.

# Føroyingar forvitnisliga vitjan

**Hesa vikuna hava føroyingar vitjan av Anders Kingo, sum mest sannlíkt stavar frá systir til navnframa Thomas Kingo. Hann hevur og skal halda fleiri fyrilestrar á Føroyavitjanini**



*Eftir fyrilesturin seinnapartin í gjáar var farið ein biltúr at hyggja at Norurlandahúsinum – og sjálvandi gekk leiðin eisini til Kirkjubøar. Her er Anders Kingo avmyndaður í Havnar Kirkju*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FØROYAVITJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er ikki á hvørjum degi, at føroyingar fáa so forvitnisliga vitjan sum nú, Anders Kingo er í Føroyum.

Danski presturin kom til Føroya sunnudagin, og í gjár hevði Jógvan Fríðriksson, bispur, bjóða honum at halda fyrilestrar fyri føroysku prestunum.

- Vit vóru í Havnar Kirkju, og eg helt tveir fyrilestrar fyri føroysku prestunum, sum mestsum allir vóru til staðar, ein fyrrapartin og ein seinnapartin, sigur Anders Kingo.

Aftan á var so møguleiki hjá føroysku prestunum at fáa eitt prát við kenda danska prestin um Søren Kierkegaard, sum Anders Kingo er serfrøðingur í.

Í kvøld skal danski presturin so halda ein fyrilestur í Norðurlandahúsinum, og sum hann hevur skilt, hevur stórur forhonds áhugi verið fyri hesum fyrilestrinum.

- Í gjár vóru tað tað fyrilestrar, har eg vendi mær til starvsfelagar. Í Norðurlandahúsinum í kvøld verður tað ikki sama slag av fyrilestri. Har verður tað meiri fólksligt, sigu Anders Kingo.

Í fyrilestrinum í kvøld fer hann at koma inn á lívið hjá Søren Kierkegaard, lestrartíðina og serligu evni høvundans. Hann fer at nema við, hvat Kierkegaard vildi við skriving síni og sínum serliga máta at skriva.

Í annaðkvøld verður so eisini ein fyrilestur, hesaferð í Miðlahúsinum saman við Jógvani Fríðriksson, biskupi. Roknað verður við einum øðrum slagi av áhoyrarum.

- Tá verður roknað við yngri áhoyrarum, sum kanska ikki eru trúgvir kirkjugangarar, men eru meiri áhugaðir í Kierkegaard sum littererum persóni, sigur Anders Kingo.

Hóskvøldið verður seinasti fyrilesturin so í Klaksvík, áðrenn leiðin gongur aftur til Danmarkar fríggjadagin til prestagjald sítt beint uttan fyri Sønderborg í Suðurjútlandi.

Sum so mangir aðrir útlendingar, er eisini Anders Kingo bergtikin av føroysku náttúruni, og tá hann kemur aftur næstu ferð, skal tað bæði verða meiri frítíð og longri vitjan.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -12 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -5 |
| Ammassalik | -5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 16 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 15 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | -- |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Ein veikur hátrýstrygur. 1006 hPa. vestan fyri Føroyar verður yvir Føroyum mikunáttina.



**Í dag:**
Hátrýstryggurin yvir Føroyum fer eystureftir. Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/03 kl. 06[00] – 09/03 06[00]. Hitin í gjár: 4,6°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 16,0 mm – mált frá 08/03 kl. 06[00] – 09/03 06[00].
Avfallið higartil í mars: 50 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo




## VESTFALLSKYRRINDI

4. mars – Fyrra kvarter
7. mars – Mánin næstur jørðini
11. mars – Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. mars | 05:51 | 18:15 | 04:51 | 17:15 | 05:06 | 17:30 | 07:51 | 20:15 | 08:51 | 21:15 | 04:06 | 16:30 | 03:06 | 15:30 | 06:06 | 18:30 | 07:06 | 19:30 | 05:36 | 18:00 | 06:51 | 19:15 |
| 11. mars | 06:36 | 18:58 | 05:36 | 17:58 | 05:51 | 18:13 | 08:36 | 20:58 | 09:36 | 21:58 | 04:51 | 17:13 | 03:51 | 16:13 | 06:51 | 19:13 | 07:51 | 20:13 | 06:21 | 18:43 | 07:36 | 19:58 |
| 12. mars | 07:21 | 19:43 | 06:21 | 18:43 | 06:36 | 18:58 | 09:21 | 21:43 | 10:21 | 22:43 | 05:36 | 17:58 | 04:36 | 16:58 | 07:36 | 19:58 | 08:36 | 20:58 | 07:06 | 19:28 | 08:21 | 20:43 |
| 13. mars | 08:06 | 20:28 | 07:06 | 19:28 | 07:21 | 19:43 | 10:06 | 22:28 | 11:06 | 23:28 | 06:21 | 18:43 | 05:21 | 17:43 | 08:21 | 20:43 | 09:21 | 21:43 | 07:51 | 20:13 | 09:06 | 21:28 |
| 14. mars | 08:51 | 21:14 | 07:51 | 20:14 | 08:06 | 20:29 | 10:51 | 23:14 | 11:51 | - | 07:06 | 19:29 | 06:06 | 18:29 | 09:06 | 21:29 | 10:06 | 22:29 | 08:36 | 20:59 | 09:51 | 22:14 |